## Kristian ella Søren?

Nú Lars Løkke Rasmussen er vorðin forsætisráðharri, verður hann eisini formaður í stjórnarflokkinum Vinstra. Tískil skal flokkurin hava ein nýggjanm næstformann, og danskir fjølmiðlar gita, at skattamálaráðharrin, Kristian Jensen, hevur teir bestu møguleikarnar at taka við. Sambært JyllandsPostinum er avgerðin longu tikin, og Kristian Jensen váttar eisini fyri blaðnum, at hann stillar upp sum næstformaður. Summir fjølmiðlar halda tó, at Lars Løkke Rasmussen hevur betri hug at fáa verjumálaráðharran Søren Gade til næstformann.



## Vaktarskip av bakkastokki

Tann 29. apríl fer eitt nýtt skip til íslendsku vaktar- og bjargingartænastuna av bakkastokki á Asmar-skipasmiðjuni í Kili. Byggikostnaðurin er 30 milliónir evrur, og sambært Morgunblaðnum megnar skipasmiðjan at halda bæði kostnaðar- og tíðarætlanina, soleiðis at skipið verður latið íslendingum tíðliga næsta ár sum ætlað. Nýggja vaktar- og bjargingarskipið er 4.250 bruttotons, 93,65 metrar langt og 16 metrar breitt. Tað hevur tveir høvuðsmotorar, sum eru 4.500 kw hvør. Togmegin verður 120 tons, og skipið er ætlað at ganga 19,5 míl.

Gjørdu klárt til neyðlending:

# Rólig lending í Vágum




*Løgreglan greiddi í gjár frá, at øll tiltøk vóru sett í verk til eina lending, har flogfarið kundi fara av breytini, men hetta merktu ferðafólkini ikki*

**Eftir øllum at døma var púra róligt umborð á flogfarinum, sum vendi aftur til Vágar í gjár, hóast øll tiltøk vóru sett í verk til eina neyðlending**

LENDING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast øll tiltøk vóru sett í verk til ein møguliga neyðlending í Vágum í gjár, so merktu ferðafólkini umborð onki til hetta.

- Eg havi flogið nógv í mínum lívið, og hatta var helst róligasta lending, eg havi verið við til í Vágum, sigur Rólant Poulsen, ferðafólk. Hann vísir somuleiðis á, at ongin panikkur var umborð yvirhøvur, og at fólk als ikki vóru bangin, um hvat kundi henda.

- Eg hugdi nevniliga rundan um meg, og tað sá ikki út til, at tað nervaði nakran, at vit vendu aftur. Fólk sótu og lósu, og annars sótu tey og prátaðu saman, greiðir Rólant Poulsen frá.

### Í góðum hondum

Tá avgerðin varð tikin at venda aftur, greiddi flogskiparin ferðafólkunum frá støðuni.

- Hann greiddi frá, hann ikki fekk læst eitt hjól, og at vit tí vendu aftur í Vágar. Annars var onki fjas. Flogternurnar gingu og prátaðu við fólk, júst sum vanligt. Tað var ikki fyrr enn aftaná, at vit fingu at vita, at tað kundi verið álvarsligari, enn tað varð, greiðir ferðamaðurin frá. Hann leggur afturat, at tað sýntist sum alt var í lagið, uttan tað, at tey máttu venda aftur í Vágar, og tí gjørdust eitt sindur seinkað.

### Góð lending

Tornið boðaði løgregluni frá, at kanska fór at verða talan um eina lending, har neyðugt kundi verða at flogfarið fór út í bøin eftir lending, men sambært Rólanti Poulsen, merktu tey hetta ikki á nakran hátt.

- Tað kann vera, at flogskiparin hevur sett ferðina so langt niður, sum hann kundi, tí lendingin var millum tær róligastu, eg havi verið við til í Vágum, staðfestir Rólant Poulsen.

# Rørsluárið flytur seg

**Komandi tíðina vera tiltøk í samband við rørsluárið. Talan verður um nakað somu útgávu, sum tá tiltakið byrjaði í Norðurlandahúsinum. Tó verður alt eitt sindur minni og kring landið**

RØRSLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Rørsluárið hevur nú verið í gongd í eina tíð, og nú ætla fólkini aftanfyri at varpa enn meira ljós á tiltakið við at fara á rundferð kring landið.

Ætlanin er, at nakrir dagar í apríl skulu nýtast til hesa missiónsferð fyri rørslu. Sambært fyrireikarunum verður talan um dagarnar 15. til 22. apríl, tá ætlanin er at fara til Suðuroy, Sandoy, Norðoyggjar, Vágar og Eysturoy.

Einasta nýggja punktið á skránni er, kjak verður, um hvat ávísu økini, har vitjað verður, kunnu gera fyri at vaksa um rørsluna.

### Minni útgáva

Tá tiltakið var sett í Norðurlandahúsinum fyri tíð síðan, vóru fleiri útlendskir serfrøðingar í ítrótt við, men soleiðis verður ikki nú.

Hinvegin fer Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, at greiða frá rørsluárinum, umframt at Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum, fer at greiða frá, hvussu føroyingar røra seg. Eisini fer Magni Mohr, P.hD. í fysiologi, at greiða frá, hvussu ymiskir venjingarhættir kunnu nýtast, til ymisk endamál.

### Lokal tiltøk

Somuleiðis er greitt, at ymisk umboð fyri øki innan rørslu í Føroyum, fara at greiða frá, hvussu tey gera, fyri at fáa fólk at røra seg. Á tí skránni fer Sølvi R. Hansen at greiða frá, hvat ítróttarfeløgini kunnu gera, Dávur Winther fer at greiða frá ymiskum tiltøkum í Klaksvík, umframt at evnini eldri og rørsla, rørsla á arbeiðsplássum og rørsla hjá yngri og eldri børnum verða viðgjørd.



*Framyvir er ætlanin, at tað ikki bara skulu vera havnarfólk, sum fáa skulu fáa gleði av rørsluárinum*